Føroysku feløgini fingu bæði stig

Enn eina ferð eydnaðist tað Toda og teimum at fáa neyðugu málini stutt undan leikloki, meðan Christian Høgni og teir spældu málleysan javnleik

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tveir føroyingar eru í bestu donsku deildini. Teir eru báðir álopsspælarar. 2. páskadag vóru teir báðir á útivølli. Báðir vóru ímillum teir fyrstu ellivu, og báðir vórðu skiftir út, uttan at tað hevði eydnast teimum at fáa mál.

Talan er sjálvandi um Christian Høgna Jacobsen í Vejle álopinum og um Toda Jónsson í FCK álopinum.

Meðan fleiri lutir vóru teir somu í dystargongdini hjá teimum báðum føroyingunum mánadagin, so er tað lítið, sum kann sammetast, tá talan er um FCK og Vejle.

Todi er fulltíðar yrkisspælari í ríkasta felagnum í Danmark. FCK hevur nógvar sáttmálasettar spælarar, og teir stríðast hvørt ár fyri at sleppa upp í part í Europa Cup og helst í kappingini fyri meistaralið. Christian Høgni Jacobsen er sáttmálabundin í Vejle. Úrvalið av spælarum er ikki serliga stórt, og felagið hevur ikki ráð at rinda spælarunum somu upphæddirnar, sum teir í FCK fáa. Støðutalvan boðar frá, at Vejle er í vanda fyri at flyta niður, og tað er við tí fremst í huganum, at tað skal sleppast undan skjótari niðurflyting (teir fluttu upp í fjør), at Vejle vikuskifti eftir vikuskifti fer á vøllin.

Todi í hálvfinaluni

Á páskum hava teir í FCK verið tvær ferðir í dysti. Fyrra ferðin var langa fríggjadag, tá Todi og liðfelagarnir vóru í Næstved og spældu fjóðringsfinalu í steypakappingini. Næstved var síðst í sjeyti og í áttati árunum frammarlaga í bestu deildini. Nú eru teir langt frá tindinum. Tað sást væl, tá teir høvdu vitjan av FCK, sum vísti professionelt avrik og vann 5–1. Todi Jónsson skoraði eitt mál, og hann var upphavið til tvey brotssprørk, sum bæði bóru mál við sær.

– Møguleikin fyri at fáa Brøndby aftur í landskappingini er lítil. Tí hevur tað stóran týdning fyri okkum at vinna steypakappingina. Tá vit næstsíðsta sunnudag spældu málleysan javnleik ímóti AB, misnýtti eg fleiri møguleikar. Tí hevði tað stóran týdning hjá mær at skora ímóti Næstved, sigur Todi Jónsson.

Í hálvfinaluni skal FCK spæla ímóti Esbjerg. Fyrri dysturin verður í Parkini í kvøld. Í hinari hálvfinaluni hittast OB og Randers Freja. Felagið, sum Atli Gregersen spælir við (Atli er ikki á besta liðnum hjá Randers Freja í løtuni) sendi eftir brotssparkskapping Silkeborg úr steypakappingini.

Tað tók sína tíð

2. páskadag var FCK í Viborg. Har høvdu teir ikki vunnið síðani í 1993. At teir í FCK tóku uppgávuna í stórum álvara vístu teir við longu 1. páskadag at fara úr høvuðsstaðnum og til Jyllands.

FCK var leikliga omaná, og teir høvdu fleiri málmøguleikar, men tað gekk striltið – ógvuliga striltið – at fáa mál. Zuma, Todi og Morten Bisgaard høvdu møguleikar, men pólverski Viborg málverjin stóð seg væl. Todi breyt ígjøgnum í vinstru og royndi úr spískum, men málverjin bjargaði. Ta einu ferðina setti Todi innaru síðuna undir innlegg úr vinstru, men bólturin fór uppum. Størsta møguleikan fekk Todi, tá verjuspælari kiksaði mitt fyri málinum, men málverjin var skjótur út og pareraði.



Saman við Toda Jónsson hevði Zuma hópin av málmøguleikum, men tað tók sína tíð, áðrenn FCK fekk hol á málskjótingina

Í vár hevur FCK fleiri ferðir skorað mál fram ímóti dystarenda. Harvið hava teir víst, at teir hava verið betri fyri enn mótstøðumenninir. Soleiðis var tað eisini í Viborg, og tað vóru teir í FCK sera væl nøgdir við. Meðan FCK fríggjadagin hevði spælt steypadyst, høvdu teir í Viborg hvílt seg.

Christian Lønstrup og Peter Møller skoraðu málini í 2–0 sigrinum. Málini komu í ávikavíst 84. og 87. minutti. Málskjúttarnir vóru báðir skiftir inn. Peter Møller kom í 83. minutti á vøllin fyri Toda Jónsson.

FCK sigurin hevði við sær, at Todi og teir fluttu av triðja og upp aftur á næstfremsta plássið. Teinurin upp til Brøndby er níggju stig. Tað eru níggju umfør eftir at spæla, og tí má sannlíkið fyri, at FCK skal endurvinna meistaraskapin, vera sera lítið.

Christian Høgni í lítlan tíma

Hjá Vejle var setningurin í Árhus at varðveita fjarstøðuna til AGF. Bæði Vejle og AGF eru í niðurflytingarvanda, og tí ráddi fyrst og fremst um ikki at tapa. 6.840 áskoðarar vóru á Árhus stadion og sóu gomlu jydsku stórfeløgini stríðast fyri at halda mótstøðumonnunum frá at skjóta mál. Tað eydnaðist hjá báðum þørtum. Málverjarnir báðir vórðu sagdir at vera stóru spælararnir. Ikki minst Vejle málverjin, Jesper Christiansen, sum stríðist fyri at vinna sær ferðaseðil til HM endaspælið, stóð seg væl.

Christian Høgni Jacobsen var millum teir fyrstu ellivu hjá Vejle. Hann stríddist, men treytirnar vóru ikki tær bestu, tí teir løgdu mestu styrkina í verjupartin. Tá 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamal, varð Christian Høgni skiftur út við Jerry Brown. Beint áðrenn hann varð skiftur út, fekk Christian Høgni gula kortið.

Javnleikurin hevði við sær, at Vejle framvegis heldur sær omanfyri niðurflytingarstrikuna. Men tað er bara eitt stig niður til AGF, sum í løtuni tykist vera besta boðið upp á niðurflytringarevni – saman við Lyngby.

Máltindurin

Kappingin um Løgmanssteypið		
Jens Erik Rasmussen	FSV	3
Andrew á Fløtum	HB	3
Uni Arge	HB	3
Øssur Hansen	B68	2
Marni Djurhuus	EB/Str.	2
Bartal Eliasen	GÍ	2
Jón Rói Jacobsen	HB	2
Heðin á Lakjuni	KÍ	2
Kurt Mørkøre	KÍ	2
Ove Nysted	KÍ	2
Nenad Zivanovic	VB	2

Brøndby heldur seg á kósini

Bæði liðini, sum hava kappast við FCK um næstfremsta plássið, taptu í vikuskiftinum

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað tykist lítil ivi vera um, at tað verður Brøndby, sum fer at verða danskur meistari. 33. og síðsta umfarið verður spælt hósdagin 16. mai. Tað skal vilja sera illa til, um Brøndby, sum tann dagin fer at hava heimavøll ímóti longu niðurflutta Lyngby, ikki fer at fáa gullkrónurnar stutt áðrenn, at danska landsliðið fer til Suðurkorea. Tað er eisini væl hugsandi, at teir gulu og bláu fara at tryggja sær DM í næstsíðsta umfarinum. Tað verður spælt sunnudagin 12. mai. Tá fer Brøndby at spæla í Parkini ímóti FCK. Tað er í sambandi við tann dystin, at Sosialurin og Atlantic Airways skipa fyri fótbóltsferð til Keypmannahavnar.

Brøndby er nýggju stig frammanfyri FCK. Umframt dystin ímóti FCK eru átta umfør eftir at spæla. Tað man vera lítið sannlíkt, at Brøndby í hesum umførunum skal missa sjey stig meiri enn FCK.

Dygg mótstøða

Mánadagin var Esbjerg í Brøndby, har næstan sekstan túsund møttu upp í góða danska páskaveðrinum. Heimaliðið vann 1–0. Peter Madsen, sum verður mettur at hava góðar møguleikar at sleppa við Morten Olsen til HM endaspælið, stútaði málið í 2. hálvleiki. Hetta var fimti dysturin upp í slag, at álopsmaðurin, sum ivaleyst verður seldur til útlandið í summar, skoraði fyri Brøndby.

Esbjerg gjørdi serliga í 2. hálvleiki dygga mótstøðu, og tað hevði ikki verið púra burturvið, um teir høvdu megnað at javnað.

Komandi sunnudag skal Brøndby spæla á útivølli í Vejle. Sjálvandi verður Brøndby stórfavorittur, men Christian Høgni og teir fara í hvussu so er at hava ein teoretiskan møguleika at økja um møguleikarnar hjá Toda og teimum.

AaB kiksaði

Undan 2. páskadegi hevði AaB vunnið allar fýra landskappingardystirnir, sum høvdu verið spældir síðani vetrarsteðgin. Langa fríggjadag tapti AaB eftir brotssparkskapping fjórðingsfinaluna í steypakappingini ímóti OB. Á heimavølli ímóti niðurflytingarhótta Silkeborg skuldi vónbrotið í fjórðingsfinaluni í steypakappingini vaskast burtur, men tað miseydnaðist.

Eins og í steypadystinum ímóti OB gekk illa at fáa mál. Øll eygu vóru vend ímóti leigusveininum Mikkel Beck, og hann noyddist fyri fimtu ferð upp í slag at fara av vøllinum uttan at hava skorað. Silkeborg vann 2–0. Teir komu á odda í 1. hálvleiki. Eftir steðgin trýsti AaB sera nógv, men teir fingu ikki mál, og so tørnaði tað út, sum tað so ofta hevur gjørt í fótbólti, tá annað liðið trýstir og ikki fær mál. Í einum mótálopi skoraði Silkeborg. Harvið fingu teir luft í kappingini um at sleppa undan niðurflyting.

AaB hevði síðani vetrarsteðgin lyft seg av 4. og fram á 2. plássið, men nú eru teir aftur aftanfyri FCK.

OB var í Ikast og spældi ímóti FCM. OB vann 1–0, og nú eru tað teir í Odense, sum verða sagdir at vera mest støðuga liðið í vár.

AB hevði tapt eina rúgvu fyrstu umførini eftir vetrarsteðgin. Mánadagin høvdu teir vitjan av amatørunum úr Lyngby, og tað eydnaðist at vinna 3–0. Men tað gekk illa við málskjótingini. Í steðginum var støðan bara 1–0, og tað var ikki fyrrenn í síðstu løtu, at AB skoraði tvær ferðir afturat. Heine Fernandez, sum AB í vetrarsteðginum keypti úr FCK, skoraði øll trý málini.

Skráin fyri komandi vikuskiftinum sær soleiðis út: AGF-FCM, EsbjergAaB, FCK-OB, Lyngby-Viborg, Silkeborg-AB og Vejle-Brøndby.

Endiliga eydnaðist hjá Hvidovre

Hjá Johan B. Hansen og Fredericia hilnaðist illa, meðan Randers Freja á heimavølli fekk fulla úrtøku

1. DEILD Í DANMARK
Jóannes Hansen

Tað hevði í fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin roynst stak illa hjá Óla Johannesen og hinum í Hvidovre. Fyrst taptu teir 2–1 á útivølli í Odense ímóti B1909,og so taptu teir við somu tølum ímóti Herfølge. Á útivølli ímóti grannunum úr Frem var einki mót um Hvidovre, men tað hilnaðist framúr væl í Valby parkini.

Hvidovre vann 3–1 ímóti Frem, sum við gamla venjaranum hjá Jákupi Mikkelsen, Ole Mørch, við róðrið, leingi hevur verið næstfremst og harvið á uppflytingarplássi.

Hvidovre kom á odda, men tað stóð nógv á, áðrenn tað var greitt, at teir kundu fara út aftur í Hvidovre við øllum stigunum. Tað restaði ein stórur hálvur tími, tá ein av viðspælarunum hjá Óla Johannesen fekk reyða kortið. Frem setti Óla Johannesen og hansara menn undir stórt trýst, men tað eydnaðist at varðveita leiðsluna. Serliga málverjin hjá Hvidovre, Stephen Andersen, verður sagdur at hava spælt framúr væl.

Í Farum hevur seinastu tíðina verið nógv rok. Ivasamt er framvegis, hvussu tað fer at roynast hjá fótbóltsfelagnum, sum Peter Brixtofte hevur verið formaður fyri. Upphæddirnar, sum seinastu árini hava runnið til felagskassan úr eitt nú kommunukassanum og køssunum hjá fyritøkum, sum borgarstjórin hevur syrgt fyri at veita fyrimunir í kommununi, verða neyvan eins stórar komandi árini.

2. páskadag hevði Farum vitjan av HJK úr Suðurjyllandi, sum hevur ætlanir um at flyta upp í bestu deildina. Farum hevði gott tak á tí og vann 4–1. Harvið eru hesi bæði liðini jøvn á næstfremsta plássinum. Køge, sum orsaka av salmonellu hevur fingið tveir dystir útsettar, er fremst.

Johan B. Hansen er útleigaður frá OB og til Fredericia í næstbestu deildini. Har hevur ikki gingið nakað serligt. Fredericia er í niðurflytingarvanda, og í hesum umfarinum var eingin úrtøka. Fredericia hevði vitjan av FC Árhus, sum við Flemmingi Povlsen, fyrrverandi landsliðsálopsspælaranum, á odda hevur stórar ætlanir. FC Árhus vann 1–0.

Fyri fyrstu ferð síðani vetrarsteðgin eydnaðist tað hjá Óla og teimum í Hvidovre at vinna dyst í næstbestu donsku deildini

Randers Freja hevði tað gott á páskum. Eftir sigurin á Silkeborg í fjórðingsfinaluni í steypakappingini langa fríggjadag, hevði Randers Freja mánadagin vitjan av Kolding. Heimaliðið vann 2–0.

Danska superligan

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Brøndby	24	16	-	5	-	3	55	19	36	53
2	FCK (M)	24	12	-	8	-	4	40	18	22	44
3	AaB	24	13	-	4	-	7	40	31	9	43
4	OB	24	10	-	8	-	6	37	33	4	38
5	Esbjerg	24	11	-	4	-	9	36	34	2	37
6	AB	24	9	-	9	-	6	36	25	11	36
7	FCM	24	8	-	9	-	7	28	20	8	33
8	Viborg	24	6	-	10	-	8	26	29	-3	28
9	Silkeborg	24	6	-	5	-	13	26	32	-6	23
10	Vejle	24	5	-	6	-	13	28	55	-27	21
11	AGF	24	4	-	8	-	12	26	38	-12	20
12	Lyngby	24	2	-	8	-	14	20	64	-44	14

Føroyskir leikarar:Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Køge	16	13	-	1	-	2	34	13	21	40
2	Frem	18	10	-	5	-	3	38	20	18	35
3	Farum	17	10	-	5	-	2	37	23	14	35
4	B 1913	18	10	-	4	-	4	32	25	7	34
5	HFK Sønderj.	17	10	-	3	-	4	33	23	10	33
6	Herfølge	18	9	-	5	-	4	28	19	9	32
7	AC Horsens	18	8	-	5	-	5	25	18	7	29
8	Randers F.	18	7	-	5	-	6	25	21	4	26
9	FC Aarhus	17	6	-	5	-	6	24	26	-2	23
10	B 1909	18	5	-	5	-	8	31	41	-10	20
11	Brønshøj	18	5	-	4	-	9	26	33	-7	19
12	Hvidovre	18	4	-	6	-	8	27	35	-8	18
13	Fredericia	17	3	-	4	-	10	19	24	-5	13
14	B93	18	3	-	4	-	11	22	40	-18	13
15	Kolding FC	18	3	-	2	-	13	30	48	-18	11
16	Skive	18	2	-	3	-	13	20	42	-22	9

Føroyskir leikarar:Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Hollendska toto-deildin

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FC Zwolle +	29	18	-	7	-	4	52	28	24	61
2	RBC Roo'daal	29	18	-	5	-	6	66	32	34	59
3	Excelsoir +	29	17	-	7	-	5	64	29	35	58
4	ADO Den Haag	29	16	-	7	-	6	48	30	18	55
5	Emmen	29	16	-	7	-	6	47	31	16	55
6	Cambuur/L. +	29	13	-	6	-	10	44	33	11	45
7	FC Volendam	29	12	-	7	-	10	55	43	12	43
8	BV Veendam	29	12	-	6	-	11	51	49	2	42
9	Heracles A.	29	12	-	4	-	13	46	48	-2	40
10	Storm/Telstar	28	9	-	9	-	10	43	37	6	36
11	Dordrecht '90	29	9	-	9	-	11	55	54	1	36
12	Haarlem	28	10	-	6	-	12	34	37	-3	36
13	Helmond Sp.	29	7	-	12	-	10	29	41	-12	33
14	VVV	29	9	-	3	-	17	43	59	-16	30
15	G.A. Eagles	29	7	-	8	-	14	39	53	-14	29
16	MVV	29	7	-	7	-	15	40	55	-15	28
17	Eindhoven	29	5	-	6	-	18	40	69	-29	21
18	Top/Oss	29	3	-	4	-	22	20	87	-67	13

Perioduvinnararnir eru merktir »+«
Føroyskir leikarar:Súni Olsen (FC Zwolle)

Enska 3. deild

		d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Plymouth	42	28	-	8	-	6	63	27	36	92
2	Luton	43	28	-	6	-	9	90	48	42	90
3	Cheltenham	41	20	-	14	-	7	63	44	19	74
4	Mansfield	42	21	-	7	-	14	65	56	9	70
5	R&D	43	19	-	12	-	12	64	48	16	69
6	Rochdale	42	18	-	14	-	10	56	47	9	68
7	Scunthorpe	43	18	-	13	-	12	71	53	18	67
8	Shrewsbury	43	18	-	10	-	15	61	51	10	64
9	Hartlepool	43	17	-	11	-	15	63	47	16	62
10	Kidderm.	43	18	-	8	-	17	53	45	8	62
11	Hull C.	42	16	-	11	-	15	53	42	11	59
12	Southend	43	15	-	11	-	17	51	52	-1	56
13	Macclesfield	43	14	-	11	-	18	40	52	-12	53
14	Exeter	43	14	-	11	-	18	47	70	-23	53
15	Carlisle	41	12	-	14	-	15	49	51	-2	50
16	Darlington	42	13	-	11	-	18	54	62	-8	50
17	Swansea	43	13	-	11	-	19	50	67	-17	50
18	Torquay	43	12	-	13	-	18	42	57	-15	49
19	Leyton O.	43	12	-	11	-	20	52	69	-17	47
20	York	41	13	-	8	-	20	47	65	-18	47
21	Oxford Utd.	43	11	-	13	-	19	51	57	-6	46
22	Bristol R.	42	11	-	11	-	20	38	52	-14	44
23	Lincoln C.	43	10	-	13	-	20	41	59	-18	43
24	Halifax	43	7	-	12	-	24	33	76	-43	33

Føroyskir leikarar:Julian Johnsson (Hull C.)